# Yvirlýsing frá høvuðsstøðunum í Norðurlondum um veðurlagsbroytingar
## Sett fram undan COP21 í París í 2015

Vit, borgarstjórarnir í høvuðsstøðunum í Norðurlondum, mæla samráðingarpørtunum á COP21 í París í ár um at taka avgerandi stig á leiðini at minka útlátið av vakstrarhúsgassi og at laga kósina til veðurlagsbroytingarnar beinanvegin.

Høvuðsstaðirnir í Norðurlondum ganga á odda í bardaganum móti veðurlagsbroytingum og hava sýnt stóra ábyrgd. Býirnir hava minkað útlátið av vakstrarhúsgassi og hava fingið viðurkenning fyri at taka leiðsluna á hesum móti. Vit leggja dent á nýhugsan og nýta alsamt meira varandi orku.

**Býir okkara við sjógvin**
Høvuðsstaðirnir í Norðurlondum hava nógv í felag. Vit eru havnarbýir, og bæði samleikin og okkara eginleikar eru tongdir óloysiliga at sterku bondunum til sjógvin. Avbjóðingarnar at basa veðurlagsbroytingunum hava býirnir í felag, tí vit eru staðsett norðarlaga og liggja við sjógvin. Tað hevur avgerandi týdning, at vit minka útlátið av vakstrarhúsgassi, og at vit um somu leið tillaga okkara tørv.

**At fremja broytingina**
Okkara býir hava sýnt sterka leiðslu og tikið stig til tess at minka útlátið av vakstrarhúsgassi og økt reystleikan. UNFCCC eigur at viðurkenna avgerandi leiklutin og tað ídni, sum høvuðsstaðirnir hava sýnt hesum viðvíkjandi. Leiðarar í norðurlendsku høvuðsstøðunum eru tilreiðar at halda leiðina fram og taka fleiri framsøkin stig til frama fyri komandi ættarlið.

***Mál okkara eru, samsvarandi kørmum samtyktum í øllum býráðum, at:***

- ***Minka útlátið av vakstrarhúsgassi niður um málini, ið londini hava sett hvør í sínum lagi.***
  Meira enn helmingurin av heimsins íbúgvum búgva í býum, og áleið 75 prosent av øllum $CO_2$-útláti stavar sambært UNEP frá býum. Býir nýta nógva orku og eru partur av loysnini til tess at avmarka alheims upphitingina soleiðis, at hon ikki fer upp um 2°C. Høvuðsstaðirnir í Norðurlondum hava áhaldandi kutað útlátið við munadyggum og varandi orkuloysnum - sama hvat úrslitið hevur verið á undanfarnum samráðingum um veðurlagsbroytingarnar.

- ***Býirnir verða gjørdir reystari til tess at avmarka ávirkanina av hægri flóð, vatnflóð og ógvusligum veðri.***
  Veðrið verður ógvusligari eisini um okkara leiðir. Tað regnar av grimd, kavar nógv og lívfrøðiliga fjølbroytnið tódnar. Høvuðsstaðirnir í Norðurlondum gera í løtuni íløgur í at laga seg til settu málini. Um somu tíð hava vit prógvað, at minni útlát frá býum kann verða gjørt kostnaðargott borið saman við at tillaga býin til veðurlagsbroytingarnar.

***Soleiðis taka vit á okkum uppgávuna at basa veðurlagsbroytingunum og styðja undir reystar býir:***

- Høvuðsstaðirnir í Norðurlondum halda fram at skerja útlátið av vakstrarhúsgassi.
- Vit styðja undir hvønn annan soleiðis, at vit nýta nýhugsandi loysnir í strembanini eftir at minka útlátið.
- Vit hugsa okkum væl um og nýta nýhugsandi býarplanlegging til tess at avmarka ta ávirkan, ið hægri flóð elvir til.
- Høvuðsstaðirnir í Norðurlondum taka hædd fyri lívfrøðiligum margfeldi í býunum við nærlagdari og nýhugsandi ráðlegging.
- Vit býta millum okkum vitan, hugskot og góðar loysnir, tá ið tað snýr seg um at minka útlátið frá okkara virksemi og grønu loysnum.

**Vit mæla pørtunum, sum samráðast á COP21, um at styðja undir, at býir taka djørv tøk umhvørvinum at frama.**
Høvuðsstaðirnir í Norðurlondum bjóða lyftum á COP21, sum avmarka útlátið munandi, vælkomnum. Vit skulu tryggja, at upphitingin verður avmarkað til í mesta lagi 2°C. Høvuðsstaðirnir í Norðurlondum hava allir bundið seg til hetta mál og til at taka neyðugu stigini, ið fremja málið í verki.

Vit heita staðiliga á allar leiðarar á COP21 í París í desember 2015 um at stuðla høvuðsstøðunum í Norðurlondum og somuleiðis at stuðla teimum stigum, sum hesir bólkar taka: C40, Eurocities, ICLEI, Compact of Mayors og New Covenant of Mayors for Climate and Energy. Leiðararnir mugu tryggja, at neyðugu stigini verða tikin og at peningur og arbeiðsorka verður sett av soleiðis, at allir býir kunnu taka djarvar avgerðir veðurlagnum at frama.

Borgarstjórarnir í høvuðsstøðunum í Norðurlondum:

Keypmannahavn

Helsinki

Oslo

Reykjavík

Stokkhólm

Tórshavn